# galdandi í framtíðar kappingini



vóru avbera væl nøgd.

Eg minnist serliga eina stevnuhending, har Fredrik Hansen úr Søldarfirði, ið var løgtingsmaður og eitt skifti borgarstjóri í Nes Sóknar Kommunu, flutti fram røðu á sandinum, har hann handaði steypini eftir Eystanstevnukappróðurin. Tjaldrið hevði vunnið 5 mannafarsróðurin við dreingjum og tá róðursmaðurin ein lítil klæntrasligur óviti varð biðin um at koma fram at taka móti steypinum læt í Fredrikki. “Er de små, så er de raske”. Hesin óviti, (vit eru javnaldrar) vaks til mans og var ongin annar enn lambamaðurin, bóndi og entreprenør Tórfríður Magnussen.

Eitt svart skýggj hongur yvir kapplóðrinum, og hendingin á Skálafjørðinum í dag tyngir sinnið. Fyrst at ofrað alt, fyri at náa einum so góðum úrslitið til ber og sum sum tit á Eysturoyingi ferð eftir ferð hava prógva, og so uppliva, at alt dettur niðurfyri og møguleikin fyri føroyameistaraskapið gleppur av hondum í eini vanlukkuligari støðu, har startlínan verður føst í róðrinum, tað er ovboðið. Eysturoyingur og Vestmenningur hingu eftir og her var ongin ivi um, at so var; tí er tað óskiljandi at róðurin ikki bleiv skotin av, men helt áfram, sum um onki var hent. Í fótbólti verður tosað um fair play og at brúka videoupptøkur, tá hendingar og avgerðir, ið kunnu verða avgerandi fyri dystin vísa óreglusemi. Veit ikki hvat eftirspælið verður, men um hesin róðurin fer at telja við í samlaðu føroyameistarakappingini hjá 10 mannaførunum, er hon lítið verd.

Fari her at nýta høvi til at takka róðrarfólkinum fyri manga spennandi løtu og góð úrslit, har tit hava ligið frammi í rætta endanum. Eysturoyingur hevur verið mest vinnandi báturin av 10 mannaførunum seinastu nøgvu árini, og í úrslitum geva garparnir á Sølmundi geva teimum ein skarpan gang. Eingin kemur til slík úrslit uttan at ofra seg 100 %. Eg fari inniliga at heita á tykkum um ikki at leggja árarnar inn eftir hesa hending, men vísi stórsinnið og haldi áfram í góðum ítróttaranda.

Haldi at hetta versið í vakra sanginum hjá Petur farbróðir gevur ugga í mótgongdini.

Hann álitið hevur tær givið,<br>tú setir teg aftur í rong,<br>tak róðrið og eingin ivi,<br>vind Merkið á fulla stong.

Eitt hjartasuff havi eg tó í samband við Eystanstevnuna, og hesi viðurskiftini mugu koma í rættlag. Í FM-kappingini telur róðurin á Eystanstevnu bert við annahvørt ár. Her má og skal ein broyting koma í og eg fari enn einaferð at heita á allar góðar kreftir um at virka fyri at skipanin verður broytt, so róðurin á Eystanstevnu er FM-róður hvørt ár; hetta kann gerast uttan at nakað verður tikið frá nøkrum.

Støkk man vera tað størsta felagið í kommununi við sínum umleið 500 limum. Í ár eydnaðist tað kvinnunum at vinna vann FM kappingina í estetiskum fimleiki og tær hava eisini luttikið á HM í Finlandi. Hjartaliga tillukku við hesum fantastiska úrslitið og góða eydnu farmyvir.

Eg fari her at nýta høvi til at takka øllum teimum mongu sum fyriskipa eitt dygdararbeiði millum tey ungu, har nógv hundraðtals ungfólk møtast til ymiskt virksemi skótar, ítrótt, missións og samkomuarbeiði. Andaliga virksemi hevur góðar karmar, men ungdómurin í Runavíkar kommunu manglar eitt stað a la´ margarinfabrikkina í Havn og ungdómshúsið í Klaksvík. Mín vón er, at vit geva ungdómi okkara karmar um eitt gott tilboð eftir nevnda mynstri í hesum valskeiði.

Á sama hátt sum Martin Luther King hevði ein dreym, so líti eg fram mót tí degi, sum eg vóni er í eygsjón, at Skálafjørðurin verður ein kommuna. Avbjóðingarnar sum liggja fyri framman eru ovurhonds stórar og trupult er at ímynda sær bústaðarmynstrið og fólkatalið í meginøkinum 2015, tá undirsjóvartunnilin er veruleiki og tað bert tekur áleið 13 minuttir at koyra til Havnar og 25 minuttir til Klaksvíkar.

Tað er avgerandi, at fólkið trívist í økinum og fjølbroytt tilboð, tænastur og mentantiltøk hava ein týdningarmiklan leiklut. Ein spennandi og fyri fótbóltin mennandi ætlan verður skjótt veruleiki, tá ein risastór innilokað fótbóltshøll verður bygd í Skálabotni, har venjast og spælast kann alt árið.

Eins og tað grør um gangandi fót her í kommununi hendir tað sama í grannakommununum. Borgarstjórin á Strondum boðar frá stórum áhuga fyri at fáa grundøki til sethúsabygging, og Nes kommuna hevur stórar ætlanir í Saltnesi, har áleið 1000 borgarar eftir ætlanini fáa tak yvir høvdið, og har vit í felag kunnu verða við til at byggja eina stóra nútíðar svimjihøll.

Jú sanniliga, Skálafjørðurin hevur møguleika at gera seg galdandi í framtíðar kappingini. Tað sum krevst er, at vit síggja møguleikarnar og taka lógvatak saman, fyri at kunna lyfta uppgávurnar í felag.

Gamla orðatakið, at samanhald gevur styrki, ásannast enn í dag. Vón mín er, at vit við felags stevi og við frímóði kunna møta øllum framtíðar avbjóðingum.

Tøkk fyri tit mongu, ið komu at lýða á, og framhaldandi góða Eystanstevnu.